Jákup við mær. Teir vóru bert 3 mánaðir gamlir. Luttakaratalið her sigur nakað um, hvussu umfatandi og skiftandi norrøna lutherska virksemið var í Etiopia. Her kundu savnast um 200 trúboðarar.

Eina ferð var ein ógvusligur ófriður í samband við Ogaden. Hetta er eystasti landspartur í Etiopia, har tað búgva nógvir muslimar. Teir vildu sameinast við muslimska Somalia við valdsnýtslu.

Hetta varð mett at vera so vandamikið, at konurnar við børnum vórðu sendar heim eitt tíðarskeið. Tá kom talið niður á 40 á stevnunum. Nú man tað liggja upp móti 100. Hetta er eisini í tráð við royndirnar hjá missiónsfeløgunum at fáa fólkið á staðnum at yvirtaka størri og størri part av arbeiðinum.

## Tey sjúku verða latin eftir

Eg fekk høvi til í eini feriu at fara til Neghelli nakrar dagar. Tað var her, eg steðgaði á í 1960, tá ið eg kom til Konso á fyrsta sinni.

Á sjúkrahúsinum arbeiddu tá ein norskur lækni, kona hansara, og tríggjar norskar sjúkrasystrar saman við fleiri etiopiskum medarbeiðarum. Teir flestu sjúklingarnir komu frá Borana, sum er ein landspartur í Suður Etiopia.

Fólkið á hesum leiðum er fyri ein stóran part nomadar, sum flyta úr einum stað í annað við neytafylgjum sínum. Tí er tað so trupult at reka trúboðanarvirki millum hetta fólk. Tá ið komið verður aftur, eru tey flutt. Sum rímiligt er kunnu tey ikki hava rættilig hús. Tey seta nakrar steyrar niður í jørðina, har okkurt tilfar verður spent millum fyri at verja móti sólini.

Tá ið teir fara stað úr stað, verða tey, sum eru ov ússalig at ferðast, bert latin eftir við einum bita, nakað av vatni og tann vissa deyðan.

Teir hava ongantíð hoyrt um kristindóm fyrr.

Ófriðurin á markinum millum Etiopia og Somalia hevur eisini ført til, at ránsmannalið hava herjað og gjørt seg inn á fólkið her. Meðan eg var í Neghelli, var tað ein maður, sum lá á sjúkrahúsinum, sum fekk boð heimani frá, at trý av hansara børnum vóru dripin av ránsmonnum.

## Gamalt hatur førir til kríggj

Vit eru nú komin til september 1970. Eitt kvøld fór Jóhannes læknin til Konso. Gisli Arnkelsson kom eftir honum, av tí at tvær bygdir vóru farnar í kríggj móti hvørji aðrari, og nógvir vóru særdir. Tað er gamalt hatur, sum vaknar upp av og á. Vápnini tey nýta eru spjót, sum tey royna at renna í mótpartin. Tann, sum fer undan hevur tapt, og hetta kann vinnarin meta sum sigur. Aftaná komu tey við teimum særdu til støðina at fáa viðgerð.

## Ganga 4-5 dagar fyri at koma á sjúkrahús

Nú fór at líða væl til nýggja sjúkradeildin her í Gidole varð liðug. Vit hava lagt sjúklingar inn á tvær av teimum størstu stovunum, sjálvt um húsið ikki er liðugt. Serliga komu nógv fólk frá Borana økinum fyri at fáa skurviðgerð fyri ymsar sjúkur. Hesin landspartur liggur eystanfyri okkum, og sjúklingarnir hava ofta gingið 4-5 dagar higar.

## Doris kemur út

Í 1971 fór eg aftur heim til Føroya í farloyvi. Nú er hent tað, at Doris Heinesen úr Klaksvík hevur fingið missiónskall, og hon kemur til Gidole at loysa meg av. Tá ið eg kom aftur, virkaði hon fyrst í fleiri støðum um avloysari, inntil hon kom at arbeiða fast í Geresse.

Doris er født 1. apríl 1941 í Marstal, dóttir Esther og Fischer Heinesen. Hon tók prógv sum sjúkrasystir á Bispebjerg Hospitali i 1964. Doris starvaðist sum sjúkrasystir nøkur ár í Danmark og Føroyum. Hon tók eisini jarðarmóðurútbúgving í Bretlandi, áðrenn hon fór út.

Doris varð vígd til trúboðara sunnudagin 25. apríl 1971 í Klaksvíkar Kirkju. Prestur ta ferðina var Jacob Magnussen.

Teir, sum luttóku í vígslunu, vóru Leif Rasmussen frá Luthersk Missionsforening í Danmark, Fischer Heinesen, pápi Doris, Dia Rasmussen, Eliesar Jacobsen og Hans Jacob Ellingsgaard. Víglsan var framd av Åge Jensen, sum var formaður í Luthersk Missionsforening.

At enda talaði Doris sjálv frá kórgáttini.

## Noyddist at drekka gor

Komin út aftur í 1972 fór eg til Gata. Hetta er langt eysturi í landinum. Tískil kom eg úr Gøtu til Gata, sum annars var yrkaranavnið hjá beiggja mínum Esmari. Her var eg bert tveir mánaðir. Eg varð tá biðin um at fara aftur til Konso vegna sjúku hjá eini sjúkrasystir, íslendsku Ingun Gisladóttir. Hon doyði seinni av sjúkuni.

Demmese eitur ein drongur,



*Sjúklingar á klinikkini í Konso bíða eftir teirra tørni*

sum arbeiðir á klinikkini við skráseting av tí, sum hendir her. Vinstri fóturin á honum er krøktur, so hann gongur bert á hælinum, meðan tærnar peika upp eftir. Hann hevur arr eftir einum stórum sári, sum var atvoldin til hetta.

"Hvussu byrjaði hetta?" spyrji eg Demmese.

"Eg varð bitin av einum eiturormi, tá ið eg var smádrongur. Fyrst royndu tey ymisk heimaráð, sum einki hjálptu. Síðan fóru tey við mær til ein trøllmann. Hann skar í húðina upp eftir legginum, so at eg bløddi. Síðan drupu tey eina geit og góvu mær gorið at drekka. Eg noktaði, men har hjálpti einki, eg varð noyddur at drekka tað. Eg spýði, og eg minnist, at alt mól fyri mær. Eftir hetta var eg ógvuliga sjúkur, og eg hoyrdi, at tey talaðu saman um, at eg fór at doyggja.

Eg kom tó fyri meg aftur, og tey bóru meg síðan higar til klinikkina. Her var eg eina tíð, til sárið var næstan reint. Tá knappliga kom pápi eftir mær eina náttina og tók meg heim. Tað skuldi hann ikki havt gjørt, tí tá var tað, at fóturin fór at kropna upp eftir, sum hann er nú.

Tað kom ilt í sárið, og tað lektist ikki. Tá ið tvey ár vóru farin, komu tey aftur higar við mær, men tá var einki at gera við fótin, men sárið lektist. So fór eg at ganga í skúla her á støðini og fór at ganga ørindi og tílíkt.

Pápi var gallikja, trøllmaður. Fólk komu við kaffi, seyði, geitum og øðrum til hansara, sum hann skuldi ofra til satan. Hetta varð gjørt heima hjá okkum. Kaffi varð kókað, meginparturin varð stoyttur á moldgólvið, og restina drukku tey sum vóru til staðar.

Lambið og geitin vóru síðan dripin og blóðið rann í túnið uttanfyri dyrnar. Nakað av blóðinum smurdu tey á veggirnar á smáttunum og upp á durastavirnar. Kjøtið varð lutað sundur. Ein ella tveir menn tóku



*Gamal og nýggjur klædnamóti. Aftanfyri sæst bygdin í Konso*

tann eina lutin og fóru út um bygdina við honum til eitt stað, sum eingin annar mátti vita um. Hetta skuldi satan hava. Tað sum var eftir av kjøtinum, var síðan etið av teimum hjástøddu, meðan tey ákallaðu satan. Tað merkiliga er, at hetta eru fyriskiparnir, tó í avlagaðum líki, sum minna nakað um fyriskiparnir, sum greitt er frá í Bíbliuni. Spurningurin er, um Bíblian kann hava verið kend her í fornari tíð.

Pápi mín var tá sum oftast settur av illum anda og fell í óvit. Eg minnist, at eg var altíð ræðuliga bangin, og eg visti, at hetta var ikki av tí góða. Tá ið tað bar til, rýmdi eg frá húsum og kom ikki heim aftur, fyrr enn alt var yvirstaðið. Tá var pápi illur við meg og segði, at eg átti at heiðra Satan.

Mamma var eisini sera ágrýtin í hesum. Tað var helst, tá ið onkur var sjúkur, at hesar ofringar fóru fram. Men einki hjálpti. Trý av mínum systkjum og pápi doyðu eftir einum ári. Mamman fór eins og Demmese at ganga á møti, og bæði gjørdust kristin.

**Næstu ferð**
Í komandi parti koma vit at greiða nærri frá hungursneyðini í 1974, sum komu á forsíðurnar um allan heimin, og sum var beinleiðis orsøkin til kollveltingina, sum gjørdist ein partur av heimssøguni